# Páll Fangi róði einsamallur



Mynd: Jens Kristian Vang

**6-MANNAFØR MENN** Tá ið argastu kappingarneytarnir til oddasessin høvdu gjørt at at boykotta róðurin, var als eingin avbjóðing hjá klaksvíkingum, sum vóru nógv fremstir á mál og harvið tryggjaðu sær fult stigatal, men tað er framvegis óvist, um Páll Fangi er meistari

Tróndur Arge

Enn eina ferð var Páll Fangi fyrstur á mál. Sigurin bar við sær, at 6-mannafarið úr Klaksvík sum tann einasti báturin í hesum kappingarárinum vann fult stigatal.

Sigurin hesa ferð var væl meiri sannførandi, enn allir hinir seks undanfarnu sigarnir hava verið. Páll Fangi var tvær bátslongdir frammanfyri Strálunа av Strondum, sum aftur var tvær bátslongdir frammanfyri Skúgv úr Sandavági.

Teir á Páll Fanga søgdu seg undan róðrinum vera ógvuliga fokuseraðir á, um tað skuldi eydnast hjá teimum at taka metið í ólavsøkuróðrinum. Tað eydnaðist ikki. Tvørabáturin setti met í fjør, og tað metið megnaðu klaksvíkingar ikki at taka. Tíðin hjá Páll Fanga var fjórði besta vinnaratíðin í kappingini millum 6-mannafør við monnum á Ólavsøku.

Vinnaratíðin hjá Tvørabátinum í fjør var 4.12.06. Tíðin hjá Páll Fanga í ár var 4.19.00. Næstbesta vinnaratíðina í hesi kapping eigur Sølmundur, sum í 1983 róði teinin í tíðini 4.15.40. Triði bestu vinnaratíðina eigur Kollfirðingur, sum í 1992 vann í tíðini 4.18.16.

At tað hesa ferð eydnaðist Páll Fanga at vinna greiðari sigur, enn nakar av hinum seks sigrunum í ár hava verið, kemst av, at teir tríggir bátarnir, sum hava verið størstu kappingarneytarnir hjá klaksvíkingum, ikki tóku lut í ólavsøkuróðrinum. Talan var um Tvørabátin, Smyril úr Vági og Riddaran úr Miðvági. Saman við Hósvíkingi noktaðu hesar manningar at taka lut av prinsipiellari grund. Manningarnar vildu ikki finna seg í, at Róðrarsambandið ikki hevði kolldømt Páll Fanga í róðrunum fyrr í summar, tá ið nógv umrøddi listin var umborð á Páll Fanga.

Eftir er hjá róðrarmyndugleikanum at greiða henda spurningin og harvið at finna út av, um nakar FM vinnari skal vera í 2010, og hvør tað skal verða. Tær avgerðirnar fara at vera tiknar á skrivaraborðinum, men fyri allar partar kann tað ikki vera annað enn harmuligt, at keðiligur skuggi at enda varð kastaður yvir hesa kappingina, sum hevur verið millum tær mest tøttu og spennandi, hóast hetta er einasta kappingin, har vinnarin var tann sami hvørja ferð!

trondur@sosialurin.fo

| | |
|---|---|
| 1 Páll Fangi | 04:19.00 |
| 2 Strálan | 04:25.17 |
| 3 Skúgvur | 04:31.00 |
| 4 Húsfrúgvin | 04:33.16 |
| 5 Lómur | 04:33.23 |
| 6 Jarnbardur | 04:35.10 |
| 7 Sølmundur | 04:46.01 |

**Endaliga støðan**

| | |
|---|---|
| 1 Páll Fangi | 49 |
| 2 Tvørabáturin | 34 |
| 3 Riddarin | 29 |
| 4 Smyril | 26 |
| 5 Strálan | 21 |
| 6 Skúgvur | 19 |
| 7 Hósvíkingur | 6 |
| 8 Húsfrúgvin | 4 |
| 9 Lómur | 4 |
| 10 Jarnbardur | 3 |
| 11 Sølmundur | 1 |



Mynd: Jens Kristian Vang

# Blikur legði fyri og endaði á sama hátt

**5-MANNAFØR DREINGIR** Barar tveir bátar hava verið við í FM kappingini, og argjadreingir tryggjaður sær meistaraskapin, tá ið teir vóru fyrstir á mál fyri fjórðu ferð og harvið vunnu 4-3 á Royndini Fríðu

Tróndur Arge

Bara tveir bátar hava í alt summar togast um FM heitið í hesi kappingini. Argjadreingir umborð á Bliki og vágsdreingir umborð á Royndini Fríðu hava verið teir einastu, sum hava vunnið, og tá ið annar hevur vunnið, so hevur hin verið næstfyrstur.

Undan ólavsøkuróðrinum stóð á jøvnum. Báðir bátarnir høvdu vunnið tríggjar ferðir, og báðir bátarnir høvdu tvær ferðir verið nummar tvey. Tí stóð á jøvnum í stigum – 39 stig í part, og harvið var greitt, at tann, sum var fremri av hesum báðum í finaluróðrinum, fór at vinna FM.

Og tað var eingin ivi. Argjadreingir umborð á Bliki vunnu ólavsøkuróðurin ógvuliga rudduliga. Starturin verður sagdur at hava serliga nógv at siga á Ólavsøku, og tað var ivaleyst tá, at so nógv varð avgjørt.

Blikur fleyg ein skut framum hinar beinanvegin, meðan Royndin Fríða smokkaði eitt sindur aftur um teir, ið royndu at fylgja við Bliki. Blikur helt stílin alla tíðina, og á málinum var hann meiri enn eina bátslongd frammanfyri Royndina Fríðu, sum menti seg og tók Firvaldin ikki so langt frá málinum.

4-3 í sigrum til Blik á Royndini Fríðu, og tað bar eitt stig meiri til argjadreingir við sær enn vágsdreingir vunnu. Blikur legði bragdliga fyri, tá ið hann vann á Norðoyastevnu, og síðani hevur hann vunnið á Eystanstevnu, Vestanstevnu og nú rundaðu teir av við sigri á Ólavsøku.

trondur@sosialurin.fo

| | |
|---|---|
| 1 Blikur | 04:38.04 |
| 2 Royndin Fríða | 04:41.04 |
| 3 Firvaldur | 04:44.16 |
| 4 Svanur | 04:46.04 |
| 5 Sílið | 04:47.00 |
| 6 Junkarin | 04:48.14 |
| 7 Teistin | 04:50.00 |
| 8 Beinta | 04:59.23 |
| 9 Jallurin | 05:02.12 |

**Endaliga støðan**

| | |
|---|---|
| 1 Blikur (FM vinnari) | 46 |
| 2 Royndin Fríða | 45 |
| 3 Firvaldur | 29 |
| 4 Svanur | 22 |
| 5 Teistin | 19 |
| 6 Jallurin | 18 |
| 7 Sílið | 11 |
| 8 Junkarin | 6 |
| 9 Havfrúgvin | 0 |
| 10 Beinta | 0 |